## Landamark hevur flutt seg

Italia og Sveis noyðast at endurskoða markið landanna millum. Orsøkin er, at sambært einari avtalu frá 1941 er ein jøkul á fjallinum Matterhorn mark millum londini, men veðurlagsbroytingarnar hava gjørt, at jøkulin er minkaður. Tað hevur við sær, at landamarkið hevur flutt seg, og tí noyðast londini at endurskoða tað, skrivar AFP úr Rom. Sum skilst eru londini samd um, hvussu markið skal flytast. Flytingin hevur lítla og onga ávirkan, tí økið er óbygt og ávirkar ikki ognarviðurskiftini hjá nøkrum einstaklingi ella felagi, skrivar AFP.



## Borgarstjórin væl móttikin í Esbjerg

Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, var væl móttikin í Esbjerg í gjár. Merkið veittraði uttan fyri ráðhúsið, og lokalu fjølmiðlarnir tóku ímóti saman við borgarstjóranum í Esbjerg kommunu, Johnny Søtrup. Nú Norrøna siglir á Esbjerg, hevur borgarstjórin, Johnny Søtrup, bjóðað til samstarv. Tað var í hesum høpi, at Heðin Mortensen var á vitjan saman við embætisfólki. Á fundi í ráðhúsinum í Esbjerg vóru felags áhugamál umrødd og samstarvsøki viðgjørd. Borgarstjórarnir meta, at fleiri áhugaverd øki eru at samstarva um, millum annað innan vinnulív, mentan og skúla. Heðin Mortensen bjóðaði borgarstjóranum í Esbjerg at vitja í Tórshavn í summar. Til tá koma fyrireikingar at gerast til formligar samstarvsavtalur, sum býráðini bæði skulu taka støðu til.




*Søgan í sangleikinum, Jekyll & Hyde, ið byggir á tí upprunaligu skaldsøguna, snýr seg um vísundamannin, Henry Jekyll, ið setir sær fyri at skilja sundur tað góða og tað ónda í menniskjanum. Á plakatini til vinstru sæst Jóannes Lamhauge, sum spælir høvuðsleiklutin í leikinum Jekyll & Hyde*

# Jóan

**Fjøllistamaðurin, Jóannes Lamhauge, sum í løtuni er lesandi í Suðuronglandi, hevur fingið høvuðsleiklutin í sangleikinum um Dr. Jekyll and Mr. Hyde. Hóast smáar vónir um at fáa leiklutin, varð Jóannes Lamhauge valdur millum tey umleið 650, sum royndarvandu til leikin**

LEIKLIST
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

23 ára gamli Jóannes Lamhauge skal í leikinum um Dr. Jekyll and Mr. Hyde stríðast móti tí ónda og tí góða í einum og sama persóni. Hann hevur nevniliga fingið krevjandi høvuðsleiklutin millum tey á leið 650 ungu fólkini, ið vóru til upptøkuroynd á universitetinum í Kent í Suðuronglandi í desember mánaði.

- Eg helt, at nú var so langt síðan síðst, og at tað hevði verið stuttligt at roynt meg á palli aftur. Eg havi ikki verið við í nakrari stórari verkætlan síðan mín høvuðsleiklut sum Jósef í Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið, sum varð settur upp í Hoydølum í 2004, sigur Jóannes Lamhauge.

Eftir fyrstu upptøkuroyndina varð stórur partur sáldaður frá, og aftaná enn eitt úttøkuumfar, vísti Jóannes Lamhauge seg at draga longsta stráðið.

- Tað fekk eg at vita stutt fyri jól. So vit hava vant nógv og leingi. Hetta er ein ótrúliga krevjandi leikur við nógvum sangi. 42 sangir verða sungnir í leikinum, og av teimum syngi eg tað